# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jens Jensen 50 ár



Í dag, fríggjadagin 31. mars, verður Jens H. Jensen í Tjørnuvík 50 ár. Jens er løgreglumaður, og hann hevur nógvu tey seinastu árini verið ein teirra, sum hevur stríðst fyri at fáa bilbukt við misnýtsluni av rúsevnum.

Jens er klaksvíkingur. Foreldrini eru Amanda fødd Mikkelsen og ættað av Vágsheygnum, og Karl Hansen, ættaður av For á Nesi í Eysturoy, og í Klaksvík nevndur Tofta Karl. Hann doyði í 1993. Amanda býr framvegis í húsunum, sum hon og Karl bygdu á Uppsalaeiði. Tey fingu fýra synir: Jákup (1951), Jens (1956), Rani (1962) og Finn (1966). Jákup býr í Havnini, Jens í Tjørnuvík, og Rani og Finn búgva í Klaksvík.

Karl hevði snikkaraverkstað úti í Klaksvík. Hann hevði fleiri sveinar í arbeiði, og nógvir lærdu til snikkara hjá honum. Millum teirra var Jens. Hann varð avlærdur í 1978.

1. august í 1979 fór Jens undir politista útbúgvingina í Keypmannahavn. Eftir lokna útbúgving í 1982 varð Jens settur í starv í Klaksvík. 1. mai í 1983 varð hann politistur í Vágum, og síðani 1. mai í 1986 hevur hann arbeitt í Havnini. Hann hevur roynt seg á so at siga øllum økjum í politistaarbeiðnum. Eitt nú var hann eitt skifti í ferðslupatruljuni, og síðani fyrst í níti árunum hevur hann verið á kriminaldeildini.

Jens er nærlagdur, og hann hevur góð evni at samskifta, og hann er sera fyrikomandi. Hesir eginleikar saman við sáttligu og myndugu framferðini munnu ivaleyst hava verið viðvirkandi til, at Jens ofta hevur leiklutin sum talsmaður. Hann er at síggja og hoyra í fjølmiðlunum, og hann vitjar á skúlum og hevur vitjan á arbeiðsplássinum av skúlanæmingum.

Jens giftist í 1986 við Hansinu Jensen úr Tjørnuvík, sum er fødd í 1964. Longu sum 12 ára gomul var hon foreldraleys – pápin, Pól Jóhannes, datt oman undir vegarbeiði í 1968, og mamman, Dagny, doyði av krabbameini í 1976. Pápabeiggi Hansinu, Jens Michael, búði hjá beiggjanum Frammi á Grønagarði, og mammubeiggin, Meinhard Heimaraklett, var frammanundan, at Dagny doyði, fluttur inn til systrina. Hansina búði saman við mammubeiggjanum og pápabeiggjanum, og Jens og Hansina giftust inn Frammi á Grønagarði. Børnini hjá Hansinu og Jens eru Jens Michael (1991) og Amanda (1994).

Jens er virkin á so mongum økjum. Blaðungur fór hann at spæla baryton í Klaksvíkar Hornorkestri og stutt eftir trombon ella trekkbasun. Síðani hann flutti til Havnar at arbeiða, hevur hann spælt í GHM, og tað kemur framvegis fyri, at hann ferðast til Klaksvíkar at hjálpa sínum gomlu bygdarmonnum at blása.

Í Javna hevur Jens tikið sítt tørn. Hann varð valdur í nevndina í 1987, og árið eftir gjørdist hann formaður. Tann sessin røkti hann inntil í 1993, tá ið hann av Føroya Landsstýri varð tilnevndur at vera formaður í Ráðnum fyri brekað. Har sat hann í fýra ár. Síðani 2004 hevur Jens verið limur í Fyribyrgingarráðnum.

Tjørnuvíkingar eru óførir at varðveita Kingo sang traditiónina. Jens er ein av Kingo sangarunum, og í bygdarlívinum er hann uppi í so nógvum. Tvær merkur av ogn eru í húsinum, og Jens er í hagastýrinum fyri Sjeyndir. Jørðin í Tjørnuvík – 24 merkur – eigur Stakkin, og Jens er við, tá ið teir røkja og søkja Stakkin. Tá ið teir í 1997 skipaðu fyri væl eydnaða tiltakinum Tjørnuvík fyrr og nú, var Jens ein av fyrireikarunum. Í mong ár hevur hann verið í kirkjuráðnum.

Føðingardagin er Jens burturstaddur.

J

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Niels Ole Lykke** fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjakvøldið klokkan 17.30. Jarðarferðin verður úr Kollafjarðar kirkju leygardagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Ole, kunnu lata eina peningagávu til Føroyskt Cystisk Fibrose felag. Konta í peningastovnunum.

**Petur Sofus Juul í Funningi** andaðist í heiminum týskvøldið 28. mars, 76 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Funnings kirkju leygardagin kl. 14. Sálmabókin verður nýtt. Tey, sum vilja minnast Petur Sofus, kunnu lata eina peningagávu á konto í Føroya Sparikassa.

**Erling Michelsen, Tórshavn**, fer til grav frá kirkjugarðskapellinum leygardagin 1. apríl, kl. 13. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjakvøldið kl. 19. Tey, ið ynskja at minnast Erling, kunnu lata eina gávu til Kristnastovu; konta í peningastovnunum.

**Dagurin í morgin**

**1.apríl. Hugo**, deyður í 1132. Biskupur í Grenoble í Fraklandi. Týskt navn, sum merkir tann skilagóði ella vísi.

**2. apríl. Teodosius**. Kann vera navnið á rómverska keisaranum Teodosiusi Stóra, sum doyði í 395. Men teir halda, at líka skjótt hevur dagurin navn eftir kristnari gentu Teodosiu, sum varð tikin av døgum umleið ár 300. Viðhvørt verður hesin dagurin róptur Teodorius. Nikolai Mohr doyði hendan dagin í 1790.

**3. apríl. Nikaitas**, deyður í 824. Abbati í Grikkalandi. Í fornkirkjuni hildu teir, at 3. apríl var dagurin, tá ið Kristus varð krossfestur.

Alif Hansen, Signabøur:

## Farin frá sum teknikari hjá MRCC




Fríggjadagin 31. mars er seinasti arbeiðsdagur hjá Alif Hansen, radioteknikara á MRCC-støðini ella Sjóvbjargingarstøðini (Tórshavn Radio), har hann hevur arbeitt síðan fyrst í 80-unum.

Hóast Alif alment fer úr starvi, kemur hann at virka eina tíð afturat sum ráðgevi. Hansara yrkisleið sum radioteknikkari í ein heilan mansaldur hevur verið líka frá teimum gomlu radiorørunum til nútíðar digitala tøkni.

Alif er havnarmaður, sonur ein av kendastu jarnsmiðjum í Havn, Hans Hansen, vanliga kallaður Hans hjá Lutherusi, sum átti og rak Smiðjuna í Lítluvík, har sum listaframsýningar eru í dag. Har sleit Alif sínar barnaskógvar og lærdi nógv jarnsmíð. Mamman var Guddid, ættað úr Hósvík.

Alif lærdi til radiomekanikara á einum Philipsradioverkstaði í Keypmannahavn frá 1954-58.

1.mars 1960 kom hann í starv hjá Fyr- og Vagervæsenet, tað sum í dag eitur Farvandsvæsenet. Hann byrjaði í Vági, men varð skjótt fluttur til Eiðis, har hann arbeiddi sum teknikari á Loranstøðini. Har var hann til fyrst í 70-unum, tá hann fekk starv sum verkstaðsleiðari á radioverkstaðnum hjá Marstein í Havn.

Fyrst í 80-unum kom hann í starv á MRCC-støðini, sum tá hoyrdi undir Post & Telegrafvæsenet. Starvsfelagarnir siga, at teir hava notið nógv gott av góðu evnunum hjá Alif, bæði sum handverkari og sum radioteknikari. Eingin uppgáva er so torfør, at Alif ikki kann loysa hana. Hann heldur seg eisini sera væl uppdateraðan reint tekniskt. Og nú MRCC stendur fyri stórum digitalum útbyggingum, so er Alif álitið. Hann hevur ongantíð arbeitt harðari enn nú, fyri at dagføringin av Tórshavn Radio skal eydnast til fullnar, so øll vera nøgd, tá tendrað verður fyri nýggju útgerðini, væntandi beint áðrenn jól í ár.

Alif er giftur Hansinu, f. Djurhuus, av Glyvrum, og tey búgva á Signabø, har hann hevur ein 28-fót bát, ið hann sjálvur hevur innrættað og bygt upp. Tey hava keypt sær eini hús við Limfjørðin, har hann kanska fær høvið til at flota bátin av og á.

Børnini hjá Alif eru: Kári, sum býr í Kvívík, Heidi, sum býr í Danmark, og Sanna, sum býr í Havn. Abbabørnini eru sjey í tali, og langabbabørnini eru tvey.





Í sambandi við, at **Heðin Mortensen**, Tórshavn, fyllir *60* ár, verður opið hús í Müllers Pakkhúsi mikudagin 5. apríl 2006 millum klokkan 15.30 og 19.00.